# VEÐRIÐ Í KLAKSVÍK



# JANUAR 2024

# VEÐURSTOVA FØROYA

# Innihald

Klaksvík ........ 3
Veðrið í býnum ........ 5
Norðan ........ 6
Landnyrðingur norðan ........ 7
Landnyrðingur ........ 7
Landnyrðingur eystan ........ 8
Eystan ........ 8
Landsynningur eystan ........ 9
Landsynningur ........ 9
Landsynningur sunnan ........ 11
Sunnan ........ 11
Útsynningur sunnan ........ 12
Útsynningur ........ 12
Útsynningur vestan ........ 13
Vestan ........ 13
Útnyrðingur vestan ........ 14
Útnyrðingur ........ 15
Útnyrðingur norðan ........ 16
Spurningar og svar ........ **Fejl! Bogmærke er ikke defineret.**

**Dagfesting**: 8. januar 2024

**Staður**: Kráargøta 56 – 700 Klaksvík

**Heimildarfólk:** Arnold Højgaard, útróðrarmaður

**Viðtal við**: Hanus Kjølbro

## Klaksvík

Klaksvík er næststørsti býur í Føroyum – bygt á einum eiði á Borðoynni.

Vestanfyri og eystanfyri eru fjøll; sunnanfyri og norðanfyri eru víkir. Beint norðan fyri Klaksvík er Kunoy, sum er høg og verjir víkina og býin ímóti vindi og aldu.

Fjøllini vestan fyri eiðið eru roknað úr norði og suðureftir: Klakkur (413m), Halgafelli (502m), Háfjall (648m), Miðfjall (493m) og Borðoyanes (394m).

Fjøllini eystan fyri eiðið eru, eisini roknað úr norði og suðureftir: Myrkjanoyrafjall (689m), Kjølur (342m) og Hæddin (563m)

Eiðið er opið í útnyrðing norðan úr í víkina (*Klaksvík*) og í landsynning sunnan (*Borðoyarvík*). Ættin liggur eftir eiðinum ikki bert á hesum báðum ættum, men eisini á ættunum beint báðumegin við.




Mynd 1: Kort av Borðoy.

Fjøllini ávirka veðrið í býnum, tá ið ættin er millum landnyrðing og landsynning ella millum útsynning og útnyrðing. Ikki øll fjøllini eru høg, og verjan ímóti vindi er tí eitt sindur ymiskt – tað velst um hvat fjall stendur fyri ættini.

Hægsta oyggj í Føroyum, Kunoy, er bert umleið 1000 metrar uttan fyri innsiglingina til Klaksvík, og hon hevur tí stóra ávirka á veðrið, tá ið ættin er úr útnyrðingi ellan norði ella landnyrðingi. Eisini forðar Kunoyggin fyri brimi í Klaksvík.

Aðrar oyggjarnar ávirka ikki beinleiðis veðrið í Klaksvík. Tó liggur býurin eystantil í landinum, og allar oyggjarnar vestanfyri gera vesturættirnar sera góðar, tá ið vindurin ikki er nógvur, men kann eisini gera vindin sera ójavnan, tá ið nógvur vindur er, stormur ella ódn.

## Veðrið í býnum

Veðrið í Klaksvík er tengt at ættini, líka sum tað er í øllum øðrum støðum í Føroyum – bert lítil munur í ættini kann gera stóran mun í veðrinum. Er liggjandi góðveður av útsynningi ella vestri í nakrar dagar, kann vera sera lýtt og gott veður við klárum lofti og nógvari sól. Liggur hann sunnaneftir, kann vera eitt fitt lot og nógv regn, og á høgætt kann vera gjøgnumtreingjandi kuldi.

Fyri at fáa greiði á hvussu veðrið er á teimum ymsu ættunum í Klaksvík, setti undirritaði seg 8. januar 2024 í samband við Arnold Højgaard (**AH**).  **AH** hevur verið sjómaður og útróðrarmaður í Klaksvík alt arbeiðslívið.

Við til samrøðuna í heiminum hjá **AH** hevði eg spurnarblað – til allar 16 ættirnar, ið vanliga eru umtalaðar í bygdin:

- Er vindurin javnur ella ójavnur á ættini
- Er meira vindur í ættini enn aðrasteðs – ella øvugt
- Er ættin vát – t.e. regn, tá ið turt er aðrastaðni – ella øvugt
- Er hetta mjørkaætt?
- Er ættin vanliga ein góð ætt ella ein ring ætt – ber til at siga tað við fáum orðum?
- Onnur viðurskifti um ættina, søgur, fyribrigdi, hendingar o.s.fr.

Spurt varð somu spurningarnar ætt fyri ætt. Byrjað varð við norðan, og var farið allan kringin runt eystureftir, og steðgað var við heil- og hálv- og millumættirnar.

Spurningar og svar og aðrar viðmerkingar síggjast aftast í hesum skjali.




*Mynd 2: Tær 32 ættirnar. Til samrøðuna eru ikki allar 32 ættirnar brúktar, men onnurhvør - t.e. heil-, hálv- og millumættirnar.*

## Norðan

Á norðurætt kemur lotið til Klaksvíkar suður ígjøgnum Haraldssund.



*Mynd 3: Ímóti norði.*

Norðan fer meira vesturyvir og strekkir seg longri enn landnyrðingur (*tráur*). Tað kundi vera tungt at koma út av víkini, tá ið hann koma av norði, men útkomin var betri.

Vindurin javnur, og vindferðin tann sama sum fyri landið.

Norðurættin kann vera vát, men er ikki mjørkaætt.

Norðan er ikki ein ring ætt, tó at eingin terri er á ættini í Klaksvík.

## Landnyrðingur norðan

Landnyrðingur norðan kemur meira inn á vánna enn landnyrðingur – men veðrið í Klaksvík líkist á hesum ættum.

Landnyrðingur norðan er góð ætt í Klaksvík.

## Landnyrðingur

Tá ið ættin er landnyrðingur, kemur lotið yvir høg fjøll á Viðoy og Borðoy, áðrenn tað er í Klaksvík.



*Mynd 4: Ímóti landnyrðingi.*

Vindur er javnur í Klaksvík, tá ið ættin er landnyrðingur, og vindferðin er nakað tað sama sum fyri landið.

Landnyrðingur er vátur, hongur í Kunoynni, tá ið tað er ikki ov nógvur vindur. Er meiri vindur, fara ælini yvir um til Húsar.

Landnyrðingur er ikki mjørkaætt, og er góð ætt í Klaksvík.

## Landnyrðingur eystan

Veðrið á landnyrðingi eystri líkist veðrinum á landnyrðingi.

## Eystan

Tá ið hann liggur av eystri, skal lotið fyrst upp um høg fjøll á eystara og vestara armi á Árnafirði, áðrenn tað er í Klaksvík.




*Mynd 5: Ímóti eystri.*

Vindurin á eystri er javnur í Klaksvík og fer út eftir vánni. Tað er ikki meiri vindur enn miðalvindferðin fyri landið.

Ættin er eitt sindur ymisk til avfall. Hon kann vera miðalgóð, men er eisini vát til tíðir.

Eystan er ikki mjørkaætt og er roknað sum ein góð ætt í Klaksvík, tó ikki á Vágheygnum. Í nógvum vindi av eystri – upp í storm – kundi vera stilli í Kalsoyarfirði.

## Landsynningur eystan

Veðrið á landsynningi eystri líkist veðrinum á eystri. Útróðrarmenn, sum fingu í stand at loysa í nógvum vindi á ættini, vendu ikki við, tí tað var gott veður norðanfyri.

Landsynningur eystan er ikki góð ætt í Klaksvík.

## Landsynningur

Tá ið ættin er landsynningur, kemur lotið uttan úr havi og rakar Borðoy í Skorðini og í Barmi, verður lyft einar 300 metar upp og fer eftir hæddini ímóti Klaksvík.



*Mynd 6: Ímóti landsynningi*

Tá ið hann liggur av landsynningi er javnur vindur ut eftir vánni. Hann sæst liggja tráur norður eftir fjøllunum – skaddur eftir fjøllunum á vestara armi.

Landsynningur strekkir allar firðir í Føroyum og gongur beint ígjøgnum. Í Klaksvík er eitt sindur meira vindur enn í landinum annars á landsynningi.

Landsynningur er vát ætt í Klaksvík, og kann vera ring mjørkaætt um summarið. Verður farið stutt, bert norður í Ánir, kundi vera sólskin. Fólk hava koyrt gras úr Klaksvík norður í Ánir at hanga í turkilag, tí eingin terri var í Klaksvík, tá ið landsynningurin var tráur.

Landsynningur er ikki roknaður sum ein góð ætt í Klaksvík.

## Landsynningur sunnan

Veðrið í Klaksvík á landsynningi suðuri líkist veðrinum á landsynningi.



*Mynd 7: Ímóti landsynningi suðuri.*

## Sunnan

Tá ið ættin er sunnan, skal lotið lotið upp um Miðfjall og Háfjall – t.e. u, 600 metrar – áðrenn tað fer oman ímóti Klaksvík.



*Mynd 8: Klaksvík úr suðuri.*

Á suðurætt er vindurin javnur – kemur ikki í hvirlum. Vindferðin er tann sama sum miðalvindurin fyri alt landið.

Ættin er vát, og kann vera ring til mjørka.

Yvirhøvur ein slavin ætt – fyri tað mesta skýggjað og keðilig.

## Útsynningur sunnan

Veðrið í Klaksvík á útsynningi suðuri líkist veðrinum á útsynningi. Vindurin er javnur.

## Útsynningur

Tá ið ættin er útsynningur, er lotið fyrst komið í land í Suðurstreymoy og yvir sunnara part av Eysturoy. Av Lambaregni er lotið komið tvørtur um Gøtuvík og er farið upp um ella báðumegin við Háfjall.




*Mynd 9: Av vøllinum við Djúpumýru í Klaksvík ímóti útsynningi.*

Vindurin á útsynningi er javnur og fer út eftir vánni. Vanliga er lítil vindur á ættini, til miðalvindferðin fyri landið er farin upp um hvassan vind.

Er hvassur vindur ella meir, er vindurin ójavnur við hvirlum.

Útsynningur er ikki ein vát ætt, og tað tann viðhvørt vera mjørki.

Útsynningur er ein heilt hampulig ætt í Klaksvík. Á útsynningi er gott útróðrarveður sunnanfyri.

Fer hann bert eitt lítið sindur vesturí afturat – upp í útsynning vestan – er hann ikki líka góður.

## Útsynningur vestan

Útsynningur vestan er ikki líka góð ætt í Klaksvík, sum útsyningur ella vestan. Ójavnari vindur.

Útsynningur vestan er, tá ið tað er illveður, størsta skaðaættin í Klaksvík.

## Vestan

Tá ið tað er vesturætt, hevur lotið tikið land við Vestmannabjørgini, farið 600 metrar upp og so farið oman fyri Streymoy og Miðeysturoy, áðrenn tað raka fjallarøðina vestan fyri Klaksvík. Tey norðastu fjøllini í røðini, Hálgafelli og Klakkur, eru ávikavist 502 m og 413 m høg. Tey verja fyri lotinum, soleiðis at tá ið vindferðin er lítil, er nokkso stilt í Klaksvík. Fer vindferðin eitt sindur upp, er vindurin ójavnur.



*Mynd 10: Ímóti vestri.*

Tá ið hann liggur av vestri, er vindurin ójavnur í Klaksvík, tá ið vindferðin er meiri enn ein strúkur í vindi. Hann kemur oman av fjallarøðini. Í Víkunum er púra stilt á vesturættini, tá ið fitt av vindi er kring landið.

Á vesturættini er vindferðin eitt sindur meiri enn miðalvindurin fyri alt landið. Tað sæst væl á skýferðini í erva, at tað er meira vindur omanfyri, enn tað er á eysturættini.

Vesturættin er turr í Klaksvík og er ikki mjørkaætt – ein góð ætt, eisini til terra.

## Útnyrðingur vestan

Veðrið í Klaksvík á útnyrðingi vestri líkist veðrinum á útnyrðingi.



*Mynd 11: Av bátabrúgvunum ímóti útnyrðingi vestri.*

## Útnyrðingur

Útnyrðingur liggur javnur suður ígjøgnum fjørðin.



*Mynd 12: Ímóti útnyrðingi.*

Útnyrðingur strekkir fjørðin, og hann er ein køld ætt. Vindurin er púrasta javnur og nokkso stabilur, og tað er vanliga eitt sindur meira vindur í ættini enn miðal fyri landið.

Ættin er góð til útróður sunnanfyri.

Við útnyrðinginum er ofta æl, sum koma við honum suðureftir, og onkuntíð er mjørki á ættini.

## Útnyrðingur norðan

Veðrið í Klaksvík á útnyrðingi norði líkist veðrinum á norði.



*Mynd 13: Ímóti útnyrðingi norði.*